**Miðlastuðulsnevndin**

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

3. februar 2022

**Mentamálaráðið**
**Tinghúsvegur 7**
**Postrúm 3279**
**FO-110 Tórshavn**

**Frágreiðing um virksemi hjá Miðlastuðulsnevndini í 2021**

Sambært § 7, stk. í løgtingslóg um miðlastuðul gevur Miðlastuðulsnevndin við árslok á hvørjum ári landsstýrismanninum eina skrivliga frágreiðing um sítt virksemi. Landsstýrismaðurin leggur frágreiðingina alment fram á netið.

Miðlastuðulsnevndin var 16. desember 2021 liðug at viðgera umsóknirnar um miðlastuðul við grundarlagi í roknskapum frá 2020. Niðurstøðan er, at seks føroyskir miðlar fáa part av samlaðu miðlastuðulsjáttanini á tvær milliónir krónur.

Sjey umsóknir vóru til miðlastuðul í 2021, sum er ein umsøkjari færri enn í fjør. Teir seks miðlarnir, ið luku treytirnar fyri stuðli, fingu úr 182.941,76 kr. upp í 606.478,77 kr. í stuðli í 2021.

Tvær milliónir vóru settar av á fíggjarlógini fyri 2021 til miðlastuðul, og býtið millum miðlarnar bleiv sum víst niðanfyri við støði í fíggjarligum upplýsingum frá 2020:

| | |
|---|---|
| Sosialurin | kr. 606.478,77 |
| Portal.fo | kr. 365.616,23 |
| Dimmalætting | kr. 349.370,30 |
| Norðlýsið | kr. 269.107,19 |
| FM1 | kr. 226.485,76 |
| VP.fo | kr. 182.941,76 |

Miðlastuðul verður játtaður við heimild í miðlastuðulslógini. Stuðulin verður latin sum ein føst grundupphædd, áljóðandi 40% av árligu játtanini á fíggjarlógini, býtt javnt millum umsøkjararnar, sum lúka treytirnar, og harumframt verða 60% av árligu játtanini latin sum ein lutfalslig upphædd í prosentum av skjalprógvaðum lønarútreiðslum árið fyri umsóknarárið hjá viðkomandi miðli.

Samlaði miðlastuðulin kann í mesta lagi vera 40% av skjalprógvaðu lønarútreiðslunum árið fyri umsóknarárið hjá einum miðli. Í mun til í fjør eru lønirnar hjá teimum seks miðlunum, sum hava fingið stuðul játtaðan, minkaðar úr umleið 21,5 til 20,1 mió. kr.

Miðlastuðulsnevndin hevur í viðgerðini av teimum sjey umsóknunum fylgt leistinum frá seinastu fýra árunum við einari lutfalsliga breiðari tulking í mun til treytirnar, ið lógin og viðmerkingarnar til lógina seta til innihaldið í miðlunum.

**Miðlastuðulsnevndin**

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

Í samband við hesa viðgerð kann nevndin leggja afturat, at umsóknirnar vórðu viðgjørdar á 4 fundum í tíðarskeiðnum 29-10-2021 til og við 16-12-2021.

Umframt at gjøgnumganga umsóknirnar fyri 2021, gjøgnumgekk og dagførdi nevndin somuleiðis vegleiðingina fyri komandi ár, eins og hon svaraði spurningum frá UMMR viðvíkjandi komandi kunngerðini fyri tann partin, sum snýr seg um verkætlanarstuðul.

Í samband við hesar broytingar væntar nevndin, at virksemið í 2022 verður nakað meira umfatandi enn tað var í 2021.

**Lønarútreiðslustuðul frá 2022**

Miðlastuðulsnevndin hevur frá fyrsta degi havt eina breiða tulking av hugtakinum lønarútreiðslur í samband við miðlastuðul. Tað merkir, at bæði løn hjá fólki í føstum starvi og samsýning fyri arbeiðið hjá leysari atknýttum arbeiðstakarum hevur verið íroknað í útrokningargrundarlagnum fyri miðlastuðulin.

Í 2021 vórðu spurnartekin sett við hesa praksis, har tað hevur verið viðgjørt at avmarka stuðulsgrundarlagið grundað á lønarútreiðslur til ta upphædd, sum er rindað út sum A-inntøka.

Komið varð fram til, at talan var um at gera eina broyting, sum miðlarnir ikki høvdu møguleika at innrætta seg eftir, tí árið, sum stuðul skuldi rindast fyri, var longu byrjað.

Í hesum sambandi hevur miðlastuðulsnevndin kunnað umsøkjararnar í 2021 um, at frá 2023, tá stuðul verður rindaður fyri fíggjarárið 2022, verður lønarútreiðslustuðulin latin grundað á ta løn, ið er rindað sum A-inntøka.

Nevndin hevur viðgjørt hendan spurningin av nýggjum, og staðfestir, at endamálið við miðlastuðulinum er at fremja samfelagsliga upplýsing og undir hesum at stuðla undir framleiðslu av miðlatilfari. Verandi praksis hjá nevndini er at byggja stuðulsgrundarlagið á bæði starvsfólkakostnað hjá miðlinum og tær samsýningar, sum eru farnar til fríyrkisfólk til framleiðslu av miðlatilfari. Hendan praksis verður mett hóskandi í mun til at røkka endamálinum í lógini, tá hetta gevur miðlunum møguleika at keypa meira fjøltáttaða framleiðslu. Nevndin er greið yvir, at møguliga er talan um eina praksis, sum víðkar hugtakið lønarútreiðslur, og tí hevði tað rættasta verið, um tað í lógarverkinum var nágreinað, hvussu lønarútreiðslur í hesum sambandi skulu skiljast.

Nevndin fer at halda fast við verandi praksis, har starvsfólkakostnaður (A-inntøka) og samsýningar (B-inntøka) fyri framleiðslu av miðlatilfari verða tiknar við í stuðulsgrundarlagið.

Viðvíkjandi partinum, sum byggir á lønarútreiðslur, hevur miðlastuðulnevndin kunnað umsøkjarar um, at hesar nágreiningar eisini verða gjørdar í komandi vegleiðingina:

1. *Miðilin skal upplýsa um øll viðurskifti av týdningi fyri metingina av stuðulsgrundarlagnum. Roknskapurin, sum verður lagdur við sum skjalprógv, skal vera grannskoðaður av løggildum grannskoðara.*
2. *Oyðublaðið skal vera útfylt, herundir eisini "stuðulsgrundarlag" við einum krónutali.*
3. *Skjal skal vera hjálagt við lønarútreiðslum (starvsfólkakostnaður og fríyrkisfólk), sum er góðkent av løggildum grannskoðara.*

**Miðlastuðulsnevndin**

Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279
FO-110 Tórshavn

**<u>Verkætlanarstuðul frá 2022</u>**

Stóra broytingin í 2022 verður, at størsti parturin av miðlastuðlinum nú verður rindaður sum verkætlanarstuðul. Allar skipanir kunnu hava sínar avbjóðingar, men miðlastuðulsnevndin er heilt greitt av tí fatan, at umskipanin til verkætlanarstuðul kann hava góðar avleiðingar á miðlaframleiðsluna í Føroyum.

Við verandi játtan á fíggjarlógini merkir hetta, at 1,4 mió. kr. av samlaðu upphæddini á 2,0 mió. kr. verða lætnar verkætlanum, sum lúka treytirnar í miðlastuðulslógini og kunngerð nr. 1 frá 23-12-2021 um miðlastuðul til verkætlanir og sum síðani verða mettar best skikkaðar at røkka endamálinum um samfelagsliga upplýsing.

Umsóknarblað og vegleiðing til hetta slagi av stuðli eru í gerð, og ætlanin er, at møguleiki verður at søkja um verkætlanarstuðul tvær ferðir um árið, á fyrsta sinni seinni í vár.

**<u>Kravið um 2 ársverk burtur</u>**

Samstundis sum lógin varð broytt, so størsti parturin verður latin sum verkætlanarstuðul varð kravið um tvey redaktionell ársverk strikað. Hetta lækkar gáttina fyri møguleikanum at søkja um miðlastuðul. Fyri verkætlanarstuðulin merkir hetta, at útboðið av góðum umsóknum kann gerast størri. Fyri lønarútreiðslustuðulin kann hendan broytingin merkja, at tað verður torførari hjá nevndini at meta um, hvør skal hava lønarútreiðslustuðul ella ikki. Væntast kann, at lønarútreiðslustuðulin frameftir skal býtast millum fleiri partar, og hugsast kann tí, at grundstuðulin verður býttur sundur í so smáar upphæddir, at tær muna lítið til eina dygdargóða framleiðslu, samstundis sum umsitingin av hesum illa svarar til nyttuna av stuðlinum.

| Eirikur í Jákupsstovu | Rógvi Olavson | Beate Lindenskov Samuelsen |
|---|---|---|
| formaður | nevndarlimur | nevndarlimur |